# Lítlar vónir til nýggja mannin

*Elsa Birgitta Petesen, forkvinna í Føroya Lærarafelag, hevur ikki betri vónir um eina loysn á arbeiðsósemjuni, nú nýggjur maður situr við skúlamálum, nevniliga varaløgmaður Høgni Hoydal.*

DAGFINN OLSEN

Eftir at Signar á Brúnni legði frá sær sum landsstýrismaður, situr Høgni Hoydal við skúlamálum. Høgni og forkvinnan í Føroya Lærarafelag hittust í Krosskasti í sjónvarpsstovuni mikukvøldið.

Elsa Birgitta Petesen, forkvinna í Føroya Lærarafelag, hevur ikki betri vónir um eina loysn á arbeiðsósemjuni, nú nýggjur maður situr við skúlamálum, nevniliga varaløgmaður Høgni Hoydal.

*– Har mugu vit siga, at har er vitanin lítil og lítil vón er til mannin, um hann ikki broytir hugburð, sigur Elsa Birgitta Petersen um Høgna Hoydal, ið nú umsitur skúlamál*



Mynd: Jón Ingi Ejdesgaard

### Lítlar vónir til Høgna

– Har mugu vit siga, at har er vitanin lítil og lítil vón er til mannin,um hann ikki broytir hugburð, sigur Elsa Birgitta Petersen, sum eisini sigur seg hava skilt á starvsfeløgum, at henda áskoðan er galdandi teirra millum.

– Hann hevði ikki rættiliga skil fyri tí, ið tað snýr seg um. Hann tosaði um at vevja saman og tað er júst tað, ið vit ikki gera. Vit reagera bert uppá nakað, sum løgtingið skuldi havt gjørt fyri trimum árum síðani, sigur Elsa Birgitta Petersen.

### Holumanshugburður

– Í okkara yvirlýsing, ið er send út, siga vit, at eitt er at Signar fór frá orsakað av sjónvarpsmálinum, men fyri forstáilsið er tað óheppið hjá okkum, at hann fór. At hann so ikki gjørdi nakað ítøkiligt og nærum var handlingslammaður, kenna vit ikki orsøkirnar til. Vit skilja heldur ikki, hví teir ikki taka fólkaskúladeildina hjá Undirvísingarstýrinum við, tí her hava tey royndirnar og vitanina. Vit høvdu kunnað strekt okkum og hava eisini boðið fram bæði 2 og 3 ár. Vit høvdu kunnað loyst ein trupulleika, sum løgtingið sjálvt er orsøk til. Men í tinginum verður einki gjørt, uttan víst til at fara aftur til gomlu lógina, sigur Elsa Birgitta Petersen, ið metir hatta vera løgnan holumanshugburð.

### Fáa stuðul

Elsa Birgitta er glað fyri stuðulin, ið hini fakfeløgini hava víst Føroya Lærarafelag. Hetta hendi á fundi mikudagin.

– Vit fingu dyggan stuðul. Bæði frá teim almennu og teimum privatu. Tað almenna er líkasum nærri okkum, men tey privatu vóru eisini við og tað má eg siga, at tað var fantastiskt, sigur ein fegin forkvinna í Lærarafelagnum.

Í gjár klokkan 15 fóru feløgini á fund við Høgna Hoydal, har tey handaðu honum skriv. Elsa Birgitta Petersen fekk tó ikki luttikið, tí Føroya Lærarafelag tók í gjár ímóti sekreterinum fyri norðurlendsku samskipanini fyri skúlar, pedagogar og lærarar.

Føroya Lærarafelag hevur fingið stuðul frá feløgum í norðurlondum. Um hini føroysku fakfeløgini fara at seta nøkur tiltøk í verk, veit forkvinnan í Føroya Lærarafelag einki um.

### Bíða spent eftir semingsmonnunum

Í gjár fyrrapartin hevði Føroya Lærarafelag einki hoyrt frá semingsmonnunum, men tey væntaðu at frætta einaferð seinnapartin.



Mynd: Jens Kristian Vang

## Blokeraðu Fíggjarmálastýrið

Aftur í gjár gjørdu næmingar í framhaldsdeildum vart við sína ónøgd, nú lærarar hava verið í arbeiðssteðgi í 3 vikur. Í gjár syrgdu næmingarnir fyri, at Karsten Hansen og onnur í Fíggjarmálastýrinum sluppu ikki innar og til verka.

Tiltøkini uttanfyri Undirvísingar- og Mentamálastýrið fyrradagin høvdu við sær, at fólkini har fóru ikki til verka, fyrr enn eftir døgurða. M.a. sluppu bilmekanikarar tí ikki til roynd fyrradagin

*- do -*

# Video, sjónvarp og PlayStation

DAGFINN OLSEN

Mikudagin fekk Barnadeildin á Landssjúkrahúsinum nýggja útgerð. Talan er um sjónvarp, video og PlayStation, sum Kiwanisklubbin Rósan hevur latið. Forkvinnan í Rósuni, Katrin Isfeldt, handaði Oddmari Færø, yvirlækna, útgerðina.

Bogi Reinert Lydersen kemur nógv á Barnadeildina til viðgerðar. Mamma hansara heitti á Rósuna um at lata sjónvarp til børnini at stytta sær stundir við.

Barnadeildin á Landssjúkrahúsinum hevur ikki fíggjarumstøður at útvega slíka eykaútgerð og fegnast tey tí um gávuna. Rósan eisini hevur áður latið til børnini á Landssjúkrahúsinum.

Rósan fær pening til vega við bingospæli, skavispølum og lutaseðlasølu.

Útgerðin, sum Rósan nú hevur latið kostar eini 10.000 krónur og er keypt frá Damor á Argjum



*Kiwanisklubbin Rósan hevur latiðBarnadeildini á Landssjúkrahúsinum gávu*
Mynd: Jens Kristian Vang

# Mætir menn á Meiarínum

*Nú ongin sjónleikur er í húsinum, bjóðar »Gríma« hølini fram til ymisk onnur tiltøk – sum tey siga í »Grímu« »Meiaríið skal vera eitt livandi mentunarhús í miðbýnum«.*

Komandi sunnudag 2. apríl kl. 16 verða verk hjá fýra mætum listarmonnum framførd: Rithøvundunum Goethe (1749-1832) og Schiller (1759-1805) og tónaskøldunum Haydn (1732-1809) og Beethoven (1770-1827). Allir fýra virkaðu um somu tíð, í sama umhvørvi og sama tíðaranda. Goethe og Schiller arbeiddu saman í Weimar, Haydn var lærari hjá Beethoven og í síni 9. Symfoni brúkar Beethoven yrkingina hjá Schiller »An die Freude«.

Nikolas Kapnas, violin, Stamen Stantchev, klaver og Jens Christian Guttesen, cello framføra 2 klavertrioir: Haydn, D-dur nr. 6 og Beethoven, opus 3 nr. 1 í C-moll.

Birita Mohr og Súsanna Tórgarð lesa yrkingar hjá Goethe og Schiller.

Tað eru tónleikararnir, Konsertfelagið og »Gríma« sum skipa fyri hesi konsertini.

Í steðginum verður høvi at hugna sær við einum kaffimunni og heimabakaðari køku.

Atgongumerkið á 80,- kr. fáast við dyrnar ein tíma frammanundan – børn sleppa ókeypis inn saman við vaksnum.

# Skilja millum lógarbrot og politikk

*Øll byrjan er trupul, men nú eru ongar umberingar longur. Vit mugu stramma upp, metir formaðurin í landsstýrismálanevndini, Edmund Joensen, nú Signar á Brúnni hevur sagt seg úr landsstýrissessinum*

DAGFINN OLSEN

Edmund Joensen, formaður í landsstýrismálanevndini, dugir ikki at síggja ítøkilig dømi um, at aðrir landsstýrismenn eru slopnir ov lætt, nú Signar á Brúnni mátti siga landsstýrissessin frá sær.

– Málið við Signari á Brúnni var í landsstýrismálanevndini seinasta heyst. Hetta er eitt ev teimum málum, har ein útreiðsla er hildin og játtan ikki fyriliggur. Tað er so greitt. Eftir starvsskipanini, skal tað sendast beinleiðis til løgtingsgrannskoðararnar, tað er púra greitt, sigur Edmund Joensen.

– Tað serliga við málinum er, at landsstýrismaðurin fyrst hevur verið í fíggjarnevndini og fingið avslag. Fíggjarnevndin biður hann senda málið til løgtingið. Hetta ger hann ikki, fyrr enn hann langt síðani hevur útgoldið peningin úr peningarenslinum. Tá ger hann bevíst ímóti skipanini og veit, at játtan fyriliggur ikki, metir Edmund Joensen.

*Tað er einki í tínum hugaheimi sum sigur, at tá Signar er rokin, so áttu onnur eisini at farið?*

– Eg kann ikki peika nakran út, men vit síggja á landsroknskapinum, at farið er um mark og tað eigur ikki at henda. Men um eykajáttan fyriliggur, so er tað lógligt og tað má skiljast ímillum, metir Edmund Joensen.

*Tað eru nógv onnur mál. Lat okkum nevna Helenu Dam á Neystabø og sjúkrahúsleiðaran ella landstýrið og leigumálið við Fiskimálastýrið, hvussu við tí?*

– Nú má skiljast ímillum politikk og lógarbrot. Landsstýrismálanevndin hevur bert at gera við, um framd eru lógarbrot. Um landsstýrið t.d. semist um at leiga ov dýrt, kann nevndin einki gera við. Borgarin má velja politikarar, ið føra skilagóðan politikk, sigur Edmund Joensen.

– Øll byrjan er trupul, men eftir at stýrisskipanarlógin og landsstýrisábyrgdin kom í 1996, er so nógv broytt.Men nú eru ongar umberingar longur. Vit eru komin í nýggja skipan og tað má fáa fylgjur, tá brot eru sjónlig.Tað má strammast upp. Annars skapar ein skeiva siðvenju, sigur Edmund Joensen, ið spentur bíðar eftir viðgerðini í tinginum týsdagin, har landsroknskapurin og onnur slík viðurskifti koma fyri.

- Tað verður spennandi at fylgja við, kanska kemur ymiskt undan kavi, sigur Edmund Joensen.



# Flúgva tosk á bretska marknaðin

*Bretar klára ikki sjálvir at nøkta tørvin á toski til væl umtóktu Fish and Cips sølubúðirnar. Tí flúgva teir føroyskan tosk úr Føroyum á bretska maknaðin*

JOHN JOHANNESSEN

Minni kvotur í Norðsjónum og Írska havinum hava ført til trot á toski í Bretlandi. Hetta hevur eisini havt ávirkan á prísin á væl kenda enska rættinum, Fish and Chips.

Orsakað av, at tað er vorðið so torført at fáa fatur á toski í Bretlandi, er prísurin á Fish and Chips meira enn tvífaldaður.

Men bretar hava funnið eina loysn á trupulleikanum. Teir eru, sambært blaðnum, Daily Mail, farnir at flúgva tosk, úr Noregi, Íslandi, og Føroyum til Bretlands.



Hans Johannes á Brúgv frá Føroya Fiskasølu sigur seg kortini ikki vita um nakrar serligar nøgdir av fiski, ið eru sendar við flogfari úr Føroyum til Bretlands.

Hann metir heldur ikki, at tað loysir seg at flúgva fisk úr Føroyum á Bretska meginlandið. Teinurin úr Føroyum til Skotlands við skipi er nevniliga so mikið stuttur, at eingin serligur munur er á um fiskurin er sendur við flogfari ella skipi.



*Heðin Mortensen hevur spurt Høgna Hoydal um tað, hann kallar herferðir fyri fullveldinum*

## Avvísir at talan er um herferðir

JOHN JOHANNESSEN

Heðin Mortensen, tingmaður Sambandsflokssins, setti á tingfundinum mikudagin, Høgna Hoydal, landsstýrismanni munnligan fyrispuring um fullveldisætlanina.

Heðin Mortensen vildi hava at vita, hvussu nógv fólk eru í starvi hjá landsstýrinum í sambandi við fullveldisætlanina, um fólk eru sett í starv í Danmark at føra herferð fyri fullveldisætlanini, hvat endamálið hjá landsstýrinum er í sambandi við Internetherðferðina. Eisini spurdi tingmaðurin landsstýrismannin í sjálvstýrismálum, hvussu nógv fullveldisætlanin higartil hevur kostað, og hvussu nógv fullveldisherðferðin frameftir fer at kosta.

### Eingin herferð

Høgni Hoydal sigur í svari sínum til Heðin Mortensen, at tvey fólk eru beinleiðis í starvi hjá landsstýrinum í sambandi við sjálvstýrismálið.

Afturat hesum er eitt starvsfólk keypt leyst til at arbeiða við sjálvstýrismálum svarandi til eitt hálvt ársverk. Afturat hesum eru átta embætisfólk á Løgmansskrivstovuni, sum meira og minni arbeiða við sjálvstýrismálum.

– Høgt sett kann sostatt verða mett, at tann orka sum hesar seinastu mánaðirnar er nýtt til sjálvstýrismál, svarar til at 5 fólk arbeiða mest sum burturav við sjálvstýrismálum. Herafturat kemur so fulltíðarstarvið sum grundlógarnevndarskrivari, sigur Høgni Hoydal í svarinum.

Høgni Hoydal sigur, at eingin kunningarherferð fer fram í Danmark, og landsstýrismaðurin avvísir eisini, at landsstýrið førir internetherferð fyri fullveldinum. Harafturímóti hevur landsstýrið upplýsir um fullveldisætlanina á internetinum, og talan er um sakligar upplýsingar.

Høgni Hoydal upplýsir, at í fíggjarárinum 1998 vórðu 463.000 kr nýttar til sjálvstýrismál. Í1999 5.441.000 kr, og í ár eru 321.000 kr higartil nýttar.

- Sjálvstýrismál hava higartil kostað 6.225.000 kr; meðan økið við árslok fer at hava kostað 10.984.000 kr hesi 3 árini tilsamans, sigur landsstýrismaðurin.

# Landsgrannskoðarin roknaði skeivt

*Landsgrannskoðari roknaði sjey milliónir krónur skeivt, tá hann gjørdi upp meirnýtsluna hjá Landsverkfrøðingsstovninum*

JAN MÜLLER

Í sambandi við grannskoðaðu roknskapirnar fyri almennar stovnar fyri árið 1998 verður sagt, at Landsverkfrøðingsstovnurin hetta árið hevði eina meirnýtslu uppá meira enn 8 mill. kr.

Hetta hevur verið endurtikið í fjølmiðlunum og hava vit vent okkum til Landsverkfrøðingsstovnin fyri at vita, hvussu tað ber til, at stovnurin hevur kunnað sprongt ein lønarkarm uppá umleið 47 mill. kr. við heilum 8 mill. kr.

Frá Landsverkfrøðingsstovninum fáa vit at vita, at tað er Landsgrannskoðarin, sum hevur roknað 7 mill. kr. skeivt.

Veruliga meirnýtslan í lønum á sjálvari rakstrarjáttanini er 900.000 kr. Henda meirnýtsla er gjørd í samráð við Vinnumálastýrið.

- Tað, sum Landsgrannskoðarin hevur gjørt skeivt, og hetta hevur hann síðani váttað fyri Landsverkfrøðingsstovninum, er, at hann hevur tikið lønarútreiðslur í sambandi við løgujáttanir til nýgerð av vegum, havnum og tunnilsgerð við í yvirlitið fyri lønarútreiðslurnar í sambandi við rakstburin av stovninum. Og har hoyra tær ikki heima verður sagt frá Landsverkfrøðingsstovninum.



Málið um grannskoðaðu roknskapirnar hjá almennum stovnum kemur ananrs til 1. viðgerð á tingi týsdagin.

Konfirmatións-
klæðir til
hansara
fáast í



Kallkyn
Vágsbotnur - tlf. 31 62 06